

# NORÐURLANDAHÚSIÐ

## TILTØK FEBRUAR 2005

**"Greivadømi"(IS) framsýning við myndum eftir Karl Einarsson Dunganon "Greivi av St. Kilda" er í Húsinum til 06. mars.**

MIKUDAGUR 2. FEBRUAR
**KL. 19.30** **Norrøna felagið (FO) skipar fyri fundi**

LEYGARDAGUR 5. FEBRUAR
**Kl. 16.00** **H. C. Andersen Parada (DK), ungdómsbólkur úr Odense framførir sjónleik úr ævintýrunum hjá H. C. Andersen.** Atgongumerki kr. 75.- eru at fáa í Kunningarstovuni í Havn, á Kunningarstovuni í Runavík og í Norðurlandahúsinum

LEYGARDAGUR 5.FEBRUAR
**PRIX undanumfar 1 (FO) í Mentanarhúsinum í Fuglafirði**

MIKUDAGUR 9. FEBRUAR
**Kl. 20.00** **Klipp filmsfelag Norðurlandahúsins sýnir svenska filmin "Om jäg vänder meg om" leikstjórnað hevur Bjørn Runge (SE) (115min). Filmurin vann 4 Guldbagevirðislønir í 2004.**

LEYGARDAGUR 12.FEBRUAR
**PRIX undanumfar 2 (FO) í Mentanarhúsinum í Fuglafirði**

LEYGARDAGUR 19. FEBRUAR
**Kl. 17.00** **Eivør (FO) og Kasahópurin (ÍS) konsert**

SUNNUDAGUR 20. FEBRUAR
**Kl. 16.00** **Jógvan á Lakjuni mentamálaráðharri (FO) lesur upp eitt ævintýr sum H. C. Andersen hevur skrivað**

HÓSDAGUR 24. FEBRUAR
**Kl. 19.30** **Quattro Musicanti (SE), Ragnhild Hadland sang, Linda Saglien Svensen trompet, P. K. Svensen trombone og Terje Hadland piano og Orgel.**

LEYGARDAGUR 26. FEBRUAR
**PRIX undanumfar 3 (FO) í Mentanarhúsinum í Fuglafirði**

**Fyrivarni verður tikið fyri møguligum broytingum!**

**Norðurlandahúsið er opið:**
**Mánadag-fríggjadag kl. 10.00-17.00**
**leygardag kl. 11.00-17.00**
**sunnudag kl. 14.00-17.00**


**NORÐURLANDAHÚSIÐ Í FØROYUM**
**Telefon nr. 317900. Telefax nr. 319790**
**www.nlh.fo e-mail: nlh@nlh.fo**


# DRAMATISKUR KÓRSANGUR

**Romeo & Julia kórið framførir tónleik, drama, sjónleik og koreografi í einari sjáldsamari eind, har gamalt og nýtt eru blandað saman**



Sunnudagin 23. januar kl. 19.30 verður konsert í Norðurlandahúsinum við svenska kórinum Romeo & Julia saman við Tórshavnar Kamarkóri.

Romeo & Julia kórið er vorðið kent kring um heimin fyri at endurskapa og endurnýggja en part av ríka tónleikaskattinum úr Renesansuni.

Stevnan hjá listarliga leiðaranum Benoit Malmberg er at lata teir 500 ára gomlu sangirnir í ein leiklistarligan búna, soleiðis at evropeiski mentanararvurin gerst livandi, og sjónleikarhúsini fáa nýggjar áskoðarar.

Bólkurin varð til í 1991 í sambandi við, at sjónleikurin Romeo & Julia varð spældur í Kungliga Dramatiska Teatern í Stokkhólmi. Eftir hetta fór kórið at menna og framføra sjálvt, og í hesum framførslum ganga tónleikur, sjónleikur og koreografi upp í ein spennandi eind. Tær myndir, sum spretta úr tónleikinum, verða knýttar at eini søgu.

Tónleikurin flytir søguna fram, samstundis sum tað leiklistarliga gevur sangunum megi. Hetta samspælið hevur ávirkað bæði áskoðarar og ummælarar um allan heimin - úr Frankaríki til Tibet.

Romeo & Julia kórið framførir eisini vanligar konsertir, har kórlimirnir hava frítt spæl, og smáar sketsjir verða framførdar uttan stórvegis fyrireiking. Málið hjá kórinum er at skapa tónleik, ið flytir mørk. Kórið ferðast nógv og var eitt nú í Íslandi í fjør. Næsti steðgur er í Norðurlandahúsinum, har Kamarkórið framførir við teimum, og kórhugaðu føroyingarnir kunnu vænta sær eina forkunnuga konsert á altjóða støði.

## PRIX FØROYAR FER Á FLOG

**Tað er eitt endurnýggjað Prix Føroyar, sum fer í luftina tann 5. februar í Mentanarhúsinum í Fuglafirði.**

Bólkarnir til Prix Føroyar eru fyri fyrstu ferð dygdarmettir frammanundan. Tilsamans 32 bólkar meldaðu til kappingina, og út frá einari demoupptøku hevur nevndin gjørt av, hvørjir teir 24 bólkar í Prix Føroyum 2005 verða.

Semifinalan verður á Tvøroyri 2. apríl og tann stóra finalan, sum nú verður kallað Atlantic Music Event, verður í Norðurlandahúsinum 23. apríl.

Egnt verður við størri vinningum hesaferð enn áður, og bólkarnir fáa fleiri møguleikar at koma út at spæla. Um tað hevur sína ávirkan, skal vera ósagt, men nógv kend og etablerað nøvn eru millum luttakararnar hesaferð, og tónleikaliga er skráin meira fjølbroytt enn onkuntíð áður.

SKRÁIN ER ANNARS HENDAN Í MENTANARHÚSINUM:

**5. februar:**
Go Go Blues Paradox, Dimmi , SIC, DejaVu og Lama Sea

**12. februar:**
PH 5,5, Side Effect, All that Rain, Makrel, Róp og MMM

**26. februar:**
Eyðun Nolsøe , Lawetz, ROK, Direct Level, Frostbit og The Dreams

**5. mars:**
Braquet , Kristleif Zachariasen, Synarchy, EGR2PLZ, Terji Rasmussen Band og onkikanndiskuterast.altkann

**2. apríl:**
Semifinalan á Tvøroyari

**23. apríl:**
Atlantic Music Event í Norðurlandahúsinum.

## ÆVINTÝRLIGUR UPPLESTUR OG PARADA UM H.C. ANDERSEN

**Upplestur og sjónleikur minna okkum á, at ævintýrini hjá gamla H.C. Andersen hava havt ein ómetaligan týdning fyri høg og lág**

Í 2005 eru 200 ár liðin, síðan mæti danski rithøvundurin H.C. Andersen varð borin í heim. Hann er heimsins mest lisni rithøvundur, og tí verður hetta sjálvandi hátíðarhildið kring allan knøttin.

Í Norðurlandahúsinum verður eisini givið pláss fyri H.C. Andersen hetta árið, og fyrstu tiltøkini verða hildin longu í januar og februar, hóast føðingardagurin ikki er fyrr enn 2. apríl.

Lagt verður til brots sunnudagin 23. januar, tá ið sjálvur Føroya løgmaður, Jóannes Eidesgaard, fer at lesa upp ævintýr í Klingruni. Tiltakið verður klokkan 16.

Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður við mentamálum, fer eisini at lesa upp úr ævintýri eftir H.C. Andersen, og tað verður í Norðurlandahúsinum sunnudagin 20. februar klokkan 16.

Tað stóra H.C. Andersen tiltakið í byrjanini av hesum árinum verður tó tann 5. februar í Norðurlandahúsinum, tá ið ein ungdómsbólkur úr Odense framførir sjónleik úr ævintýrunum hjá H.C. Andersen.

Tað er Klaksvíkar býráð, ið hevur vinarbýarsamstarv við heimbýin hjá H.C. Andersen, Odense, ið saman við Atlantis hevur fingið fatur á H.C. Andersen sýningini. Tey sýna eisini fram í skúlunum í Klaksvík og Atlantis.

H.C. Andersen Paradan er ein sjónleikabólkur við ungdómum úr Odense, sum hava havt framførslur í eitt nú Kina, Hollandi, Belgia, Týsklandi og Onglandi umframt Danmark.. Í serliga prýðiligum búnum, ið hóska til ævintýrheimin hjá H.C. Andersen, hava tey sermerkt seg við einari gjøgnumførdari skrá, har tey kendastu ævintýrini hjá H.C. Andersen eru samansett.

Við í H.C. Andersen Paraduni eru 15 ungdómar og høvuðspersónurin Torben Iversen, sum spælir H.C. Andersen, fortelur og er bindiliðið millum teir ymsu leikirnar.

Hetta er eitt ógloymandi tiltak fyri alla familjuni. Atgongumerki á 75 krónur eru at fáa í Kunningarstovuni í Havn og í Norðurlandahúsinum. So set ein kross í kalendaran tann 5. februar 2005 og tak alla familjuna við.